# Barna- og útbúgvingarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 15. apríl 2024 |
| Mál nr.: | 24/09833 |
| Málsviðgjørt: | JL/EØ |
| Ummælistíð: | 02.05.-16.05.2024 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um reglur at fremja gott skil og umsjón við næmingunum í skúlatíðini**

**....**

(Fartelefonir í skúlatíðini)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 68 frá 9. juni 2010 um reglur at fremja gott skil og umsjón við næmingunum í skúlatíðini verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í innganginum verður orðingin "við løgtingslóg nr. 34 frá 28. apríl 2009" broytt til "við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022."

**2.** Í § 1, stk. 1 verður aftan á "gott skil"sett inn "og virðiligt samskifti."

**3.** Í § 1 verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett: "*Stk. 3*. Næmingar skulu sum meginreglu ikki at nýta fartelefon í skúlatíðini. Undantøk kunnu vera í sambandi við sjúku og undirvísingarátak, har fartelefon er eitt hent amboð."

**4.** Stk. 3 verður eftir hetta stk. 4.

**5.** § 1 stk. 4 verður orðað soleiðis: "*Stk. 4*. Skúlaleiðarin veitir skúlastýrinum ráð í arbeiðinum at gera reglur sambært § 1, stk. 1, 2 og 3. Námsfrøðiliga ráðið og næmingaráðið skulu hava uppskotið til reglur sbrt. stk. 1, 2 og 3 til ummælis."

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 2. mai 2024

**Djóni Nólsøe Joensen**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen
aðalstjóri

**Skjal 1**

## Almennar viðmerkingar

Fartelefonin er í mongum førum eitt hent amboð, men í skúlanum kann hon eisini órógva og ávirka bæði undirvísingarstøðuna og bindindi hjá næmingum at hugsavna seg um læringina. Harumframt er happing eisini í ávísan mun knýtt at fartelefonini við møguleikum fyri særandi boðum og myndum. Seinasta trivnaðarkanningin vísir, at happing á netinum ikki er minkað, men framvegis er ein trupulleiki millum børn og ung.

Tað er neyðugt, at skúlin hevur fyriskipanir, so at talgild amboð sum fartelefon órógva sum minst í skúladegnum bæði í undirvísingini og sosiala felagsskapinum. Hetta hevur stóran týdning bæði fyri næmingar og lærarar, og kann hava týðandi ávirkan á samskiftið í flokkinum, og hvat næmingarnir fáa burtur bæði undirvísingarliga og trivnaðarliga.

Umráðandi er eisini, at næmingarnir sýna virðing hvør fyri øðrum og mótvegis starvsfólki skúlans. Skúlin skal í øllum sínum virksemi virka fyri einum góðum huglagi millum allar partar, har niðrandi samskifti og ókvæmisorð ikki verða góðtikin. Ásett er í endamáli fólkaskúlans, at skúlin í sátt og samvinnu við foreldrini skal hjálpa til at geva næmingunum eina siðalagsliga uppaling, og at hann skal búgva næmingarnar til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur í einum fólkaræðisligum samfelagi.

Mælt verður til at dagføra kunngerð nr. 68 frá 9. juni 2010 um reglur at fremja gott skil og umsjón við næmingunum í skúlatíðini til tess at tryggja, at fartelefonnýtsla í skúlatíðini og virðiligt samskifti verða partar av atferðarreglum skúlans.

Kunngerð nr. 68 frá 9. juni 2010 um reglur at fremja gott skil og umsjón við næmingunum í skúlatíðin hevur heimild í § 60 í fólkaskúlalógini, har ásett er, at landsstýrismaðurin ger vanligar reglur um fyriskipanir til tess at fremja gott skil í skúlunum og um umsjón skúlanna við næmingunum í skúlatíðini. Við støði í hesi kunngerð ásetur skúlastýrið sambært § 53, stk. 5 í lógini atferðarreglur skúlans og reglur um umsjónina við næmingunum í skúlatíðini.

### Viðmerkingar til einstøku dagføringarnar

1. Heimildarlógin fyri broytingunum verður galdandi fólkaskúlalóg, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022.

2. Fyri at tryggja, at atferðarreglurnar eisini verða eitt amboð at menna dagliga samskiftið, verður tilskilað, at nýttur verður ein virðiligur samskiftisháttur.

3. Í dag hevur ein stórur partur av næmingunum fartelefon við í skúla. Hetta er ein avbjóðing hjá skúlunum bæði í undirvísingini og í sosiala felagsskapinum millum næmingarnar. Fartelefonin er ikki eitt kravt undirvísingaramboð og førir eisini ofta til órógv og í ringasta føri, at næmingar senda sárandi boð sínámillum. Mælt verður tí til, at ásetingar verða gjørdar í kunngerðini, sum avmarka fartelefonnýtsluna.

4. Talan er um tekniskar broytingar, at stk. 3 verður flutt til at verða stk. 4.

5. Skúlaleiðarin hevur sambært § 55, stk. 2 og 3 í lógini bæði tað fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna í skúlanum, og hann tekur allar ítøkiligar avgerðir viðvíkjandi næmingum skúlans. Tað er tí umráðandi at skúlaleiðarin hevur ein virknan leiklut í arbeiðinum at gera atferðarreglur skúlans. Eisini verður mælt til, at bæði námsfrøðiliga ráðið og næmingaráðið verða hoyrd og kunnu siga sína hugsan um tær dagføringar, sum verða gjørdar í atferðarreglum skúlans.